# Ormaegg

Brúkast skal klárt klisturband, vatt ella tílíkt, objektglas og hylki til objektglasið. Objektglas og hylki fæst á Rannsóknarstovuni

- Beint áðrenn farið verður út undan dýnuni um morgunin, verður eitt petti av klárum klisturbandi, uml. 7 cm langt, klistrað móti baktarminum.
- Lat tað sita á uml. 1 min.
- Tak klisturbandið av baktarminum, og klistra tað niður á eitt objektglas. Trýst varliga á klisturbandið við gaze ella vatti.

Um fæces kemur á klisturbandið, kann tað ikki nýtast.

Set strikukotu frá bíleggingarseðlinum á aðra síðuna á objektglasinum, áðrenn tú leggur tað í hylkið.

Avlevera hylkið við objektglasinum og bíleggingarseðilin áðrenn kl. 11 á Rannsóknarstovuni í Útistovu (Blái bygningur), ella á Rannsóknarstovuni, G0, á Landssjúkrahúsinum.

Diagnostiski depilin
Rannsóknarstovan
Tel +298 304500, lokal 5600
Fax +298 304601